STARVSLÝSING

# Elektrikari

Søkt verður eftir dugnaligum og álitandi elektrikara til maskinmiðstøðina í Kollafirði. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um viðlíkahald og umvæling av el-útbúnaði á skervverkum og asfaltverki o.ø. hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving sum elektrikari ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars verða samsbært sáttmálanum ímillum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Handverksmeistarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir verða at senda til:

Landsverk
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 18. apríl. 2006. Merkið brævbjálvan "Umsókn handverkari". Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tel 540 950.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

Áarvegur 4-10 • Postsboks 107 • FO-110 Tórshavn
Telefon 31 32 33 • Fax 31 52 50 • hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

# Páskir á Hafnia

## Matstovan




**Leskilig 3-rættirs matskrá ... kr. 175,-**
Skírishósdag, Langafríggjadag, 1. Páskadag og 2. Páskadag
***Frá kl. 12:00 til 18:00***



*Børn upp til 12 ár gjalda ½ prís*
*Teknifilmur verður vístur fyri børnum*

BÍLEGGIÐ PLÁSS á tlf. 31 32 33

**A la carte**
Vit hava eina fjølbroytta og spennandi matskrá – hevur tú t.d. nakrantíð roynt kálvakjøt úr Bø?
***Frá kl. 18:00 til 21:30***

## Gistingar




**Dupultkamar** ........ Serprísur **kr. 350,-**
Prísurin er galdandi fyri ein persón í eina nátt, morgunmatur íroknaður.

**Einkultkamar** ........ Serprísur **kr. 500,-**
Prísurin er galdandi fyri ein persón í eina nátt, morgunmatur íroknaður.
*Børn upp til 12 ár ókeypis*

GALDANDI FRÁ 7. til 17. apríl

***GLEÐILIGAR PÁSKIR!***



**Hafnia Lounge**
Er opin Skírishósdag, leygardag og 2. Páskadag frá kl. 14:00

**Leygarkvøldið 15/4**
spæla Benjamin Petersen og Rókur Jakobsen frá kl. 22:30

**Mánakvøldið 17/4**
spæla Finnur Jensen og Ronni Poulsen frá kl. 22:30



*Hotellið í miðbýnum*

HOTEL HAFNIA

www.sosialurin.fo — Leyst starv á Sosialinum




# Grafikari

Ert tú fyrikomandi, hevur góðan grafiskan sans og førleika. Ert tú álitandi, røkin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann vit leita eftir.

Til grafisku deild okkara sóknast vit eftir fólki, ið fyrst og fremst fær til uppgávu at gera lýsingar og annað grafiskt arbeiði, sum hoyrir blaðframleiðsluni til.

Sum aktivur partur av lýsingagerðini kemur viðkomandi at vera ein týðandi bindiliður millum lýsingardeild og framleiðsluna annars í bæði nýmótans og hugnaliga umhvørvinum í Miðlahúsinum. Eisini verður tú ein týðandi partur í tilrættisleggingini av lýsingarátøkum og temabløðum.

Løn verður ásett samsbært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer á tlf. 341825. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 12. apríl, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
Att: Jonhard Hammer
Postsmoga 76
110 Tórshavn

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*

# DAGVAKT

SMS SØKIR EFTIR

**Vaktarhald í SMS**
Tað eru fýra føst vaktarfólk knýtt at SMS, tvær dagvaktir og tvær náttarvaktir.
Høvuðsuppgávan hjá vaktunum er at standa fyri trygdini í húsinum umframt at røkja ymiskar praktiskar uppgávur.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá vaktunum í SMS er at standa fyri trygdini í og uttanfyri SMS. Vaktin hevur ábyrgd av, at viðskiftafólk kenna seg trygg í SMS, bæði hvat viðvíkur ferðslu millum hini vitjandi, og tá tað kemur til brunaskipanir, rýmingavegir, eldsløkkingarskipanir v.m.
Umframt eftirlit við trygdini hevur vaktin ymiskar praktiskar uppgávur, ið serliga eru tengdar at felagsøkjunum í SMS. Hesi uppgávuøkir fevna m.a. um ventilatiónsviðurskiftini, lyfturnar, felags ljósskipanirnar, og eisini hjálpir vaktin til við praktiskum uppgávum, tá tiltøk eru á Torginum. Bygningurin SMS er stórur og rúmar eina rúgvu at hentleikum og tænastum, so roknast kann við nógvum ymiskum praktiskum uppgávum.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir persóni, ið er ábyrgdarfullur, væl skipaður, arbeiðssamur og dugir væl við fólki. Ymisku praktisku uppgávurnar krevja samstundis, at viðkomandi, ið settur verður, hevur breiðan praktiskan førleika og handaligt hegni.

**Arbeiðstíðir**
Dagvaktin arbeiðir mánadag til sunnudag frá kl. 10.00 til kl. 23.00 og hevur frí aðru hvørja viku.

**Løn**
Løn samsbært avtalu

**Umsóknir**
Áhugaði kunnu senda skrivliga umsókn til SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn, og hon skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 18. apríl.
Eru spurningar ber til at ringja til Ninnu Vatnhamar, tel. 55 88 88.

SMS